# Finst heilivágur fyri fuglakrím?

**Heilsumyndugleikar kring allan heim eygleiða í hesum døgum, hvussu fuglakrímið breiðir seg. Føroyar eru við í norðurlenskum samstarvi um at menna koppingarevni fyri fuglakrím, um sjúkan fer at smitta millum menniskju.**

FUGLAKRÍM

Í hesum døgum eru tað mong, sum spyrja hvat fuglakrím er. Fuglakrím – ella 'avier influenza' – er smittandi virussjúka, ið rakar dýr, serliga flogfenað, og í summum førum eisini svín. Fuglakrímvirus er ógvuliga slagbundið, so tað bert smittar frá fugli til fugl, men í einstøkum førum er fuglakrím farið yvirum mark, og hevur smittað menniskju.

Sjúkan kann smitta menniskju, ið hava havt samband við flogfena smittaður við H5N1 virus. Heimsheilsustovnurin WHO ber ótta fyri, at sjúkuelvandi virusið 'muterar' (broytir arvaeginleikar), soleiðis at smittan verður borin millum menniskju.

Fuglakrím hjá flogfenaði kann vera av einum veikari slagi, har sjúkueyðkennini eru fá, og fuglurin verður fjaðursárur og verpir minni. Hinvegin kann fuglakrím vera ógvuslig sjúka (há–patogen), sum breiðir seg skjótt millum flogfenað, og kann vera nærum 100% deyðilig eftir 48 tímar.

### Beinkrímvirus – hvat er tað?

Beinkrímvirus hoyrir til familjuna av vira ið rópast Orthomyxoviridae. Tey verða flokkaði í tríggjar antigen bólkar: A, B og C.

Virus úr bólkunum A og B erusjúkuelvandifyrimenniskju, og bert virus–bólkur A kann elva til pandemiskar sjúkur (heimfarssóttir).

Við beinkrím (influensu) verður sipað til serlig sjúkraeyðkenni orsaka av influensa A ella B virus.

Orðið krím hinvegin verður ofta brúkt brúkt tá ein hostar ella hevur hálsilsku. Her kunnu orsøkirnar vera ymiskar.

Tað slagið av fuglakrímvirus, ið talan er um í hesum døgum, verður rópt H5N1. Tað eru 16 H–sløg (subtypes) og 9 N–sløg (subtypes) av influenzavirus A.

Bert virus av H5 og H7–slagi tykjast at vera herviligir sjúkuelvarir (há–patogen). Influensavirus hevur uttast ein kappa av tveimum proteinum (eggjahvítaevnum): Haemagglutinin (H) og Neruraminidasu (N). H ger at virusið bindir seg til kyknur í mannakroppinum.

N er eitt enzym sum ger tað møguligt hjá virusinum at treingja ígjøgnum kyknuveggin, og at nýgjørd vira koma út úr aftur kyknuni, og harvið smitta aðrar kyknur.

### Finst heilivágur fyri fuglakrím?

Trý sløg av heilivági fyri fuglakrím eru bíløgd í størri nøgd av apoteksverkinum av hava til at taka, um fuglakrímið fer at smitta millum menniskju og gerst ein heimfarssótt.

Hesi trý sløgini av heilivági eru oseltamivir (Tamiflu), zanamivir (Relenza) og amantadin.

Føroyar eru við í norðurlenskum samstarvi um at menna koppingarevni fyri fuglakrím, um sjúkan fer at smitta millum menniskju. Arbeitt verður við eini ætlan at framleiða koppingarevni til norðurlenska marknaðin

*www.apotek.fo*



## Søguliga gongdin

**1 apríl 2005:** Eitt nýtt slag av H5N1 virusi staðfest í flytifugli á Qinghai vatninum í Kina. Økið kring vatnið er fuglaland fyri flytifugl, sum ferðast suðureftir um veturin til suðureystur Asiu, Tibet og India.

**2 Juli 2005:** Kazakhstan: Sjúkan staðfest í Pavlodar landslutinum.

**22 Juli 2005:** Virus av slagnum H5N1 staðfest í flogfenaði í Sibiria – og breiðir seg vestureftir til Novosibirsk, Altai, Omsk, Tyumen og Kurgan.

**1 August 2005:** H5N1 virus staðfest í flogfenaði í Tibet (Lhasa).

**11 August 2005:** Í Mongolia verður H5–slagið av virusinum staðfest í villdunnum, gæs og svanum.

**15 August 2005:** Í Ruslandi er fuglakrím staðfest í flogfenaði í Ural–fjøllunum (Chelyabinsk).

**16 September 2005:** Í Indonesia doyr ein 37–ára gomul kvinna – hetta merkir at av teimum 117 sum higartil eru smittaði við fuglakrími, eru 64 deyð.

**8 Oktober 2005:** Fuglakrím staðfest í flogfenaði í Rumenia og Turkalandi. Bæði londini seta í verk tiltøk at fyribyrgja at sjúkan breiðir seg. Flogfenaður verður dripin, har virus er staðfest. Ikki er staðfest hvat slag av virus talan er um.

**13 Oktober 2005:** Í Turkalandi verður herviliga H5N1 slagið staðfest í hønum. Í Rumenia er staðfest at talan er um H5–slagið av virusinum, men onki bendir á, at talan er um H5N1.

**18–21 Oktober 2005:** H5–virusslagið staðfest í villfugli í Grikkalandi og Kroatia.

**23 Oktober 2005:** Í Bretlandi verður staðfest, at ein papageykur, sum var í karantenu, doyði av H5N1 virusinum.

**12 Januar 2005:** Í Turkalandi eru higartil staðfest 18 sjúkutilburðir av H5N1 fugkakrími hjá menniskjum. Av hesum er trý deyð, øll úr somu familju.

Granskingarstovninum MRC National Institute of Medical Research í London, hevur gjørt gen gen og antigen kanningar av virusinum funnið í deyðu børnunum í Turkalandi. Kanningarnar vísa, at talan er um H5N1 virus líkt tí sum varð staðfest í flytifugli í apríl mánaði í 2005 á Qinghai vatninum í Kina. Hildið verður, at bæði sløgini av heilivági oseltamavir (Tamiflu) og amantadin kunnu brúkast at viðgera sjúkuna við, men kanningar verða gjørdar, fyri at kanna mótstøðuførið hjá H5N1 móti hesum heilivágssløgum.

*www.apotek.fo*

Heilsa & lívsstílur

maggi@sosialurin.fo

## Tilbúgvingarætlan klár 1. juni 2006

**Fyrstu stigini eru tikin til eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar í sambandi við eina møguliga influensu heimsfarsótt**

TÍÐINDASKRIV

*Almanna– og Heilsumálaráðið*

– Í sambandi við, at vit í Føroyum fyrireika okkum til eina møguliga influensuheimsfarsótt, hava vit eins og okkara grannalond tørv á einari tilbúgvingarætlan á økinum.

– Tað týdningarmesta í eini tílíkari ætlan er at tryggja tað neyðuga koppingarevnið. Á hesum økinum eru føroysku heilsumyndugleikarnir væl fyrireikaðir og í tøttum samstarvi við okkara Norðanlond.

Tað eru tó eisini aðrir partar, ið skulu koma upp á pláss í eini tilbúgvingarætlan, sum t. d. greiðar mannagongdir viðvíkjandi kunning, viðgerðarháttir, antibiotikaviðgerð, isolation, sóttverjufyriskipanir v. m. Í hesum sambandi skipaði Almanna– og heilsumálaráðið í síðstu viku fyri einum innanhýsis fundi í hesum sambandi.

Niðurstøðan á fundinum varð, at tørvur er á at seta ein arbeiðsbólk við fakfólki til at gera eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar í sambandi við eina møguliga influensu heimsfarsótt.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við eina tílíka tilbúgvingarætlan í seinasta lagi tann 1. juni 2006.

Víst verður annars til heimasíðurnar hjá ávíkavist Almanna– og heilsumálaráðnum: www.ahr.fo og Apotekinum: www.apotek.fo.




**Royn sunnan kost ið:**
- reguleran vektina
- bøtir um heilsuna
- gevur orku

**Fólk eru lætnað millum 2 til 70 kg, so eisini ber til hjá tær**

ShapeWorks™
*Independent Distributor*

Tín Herbalife forhandlari
Daniela & Willi Olsen · Tel 422367
www.nyggjanfigur.nu